## Frá skíð til tennis

Í mong ár hevur amerikanski skíðarin, Bodo Miller, verið partur av alpinu heimselituni, men nú hevur hann hug at royna seg í tennis – enntá í US Open. Hetta letur seg gera, tí amerikanska tennissambandið ætlar at royna eitt »realty-líknandi« konsept við 16 innleiðandi kappingum kring alt USA. Og her hevur Bodo Miller óivað ein møguleika, tí á ungum árum var hann statsmeistari í tennis í Maine.



## Fyrsti sigur í eitt ár

Fyri fyrstu ferð í meiri enn eitt ár hevði svenska Anja Pärson fríggjadagin orsøk til at fegnast eftir eina skíðkapping. Tá hon vann World Cup-kappingina í St. Moritz, var tað nevniliga hennara fyrsti sigur í World Cup síðani 18. januar í fjør! Anja Pärson kom á mál framman fyri Michaelu Kirchgasser úr Eysturríki og Lindsey Vonn úr USA, sum tó framvegis er á odda í samlaðu World Cup-støðuni.



**Dejan Lacok hevur fyri tað nógva verið lærari og mentor hjá Ára Dam í Neistamálinum. Sunnudagin noyddist Dejan tó á vøllin, tá lærlingurin fekk reytt kort, og við trimum framúr bjargingum syrgdi hann fyri, at dysturin fekk røttu vendina fyri Neistan**

Mynd: Álvur Haraldsen

### Neistin-KÍF 34-25 (15-11):

# Dejan bjargaði Neistanum

**Einki lið er sterkari enn bonkurin. Og styrkin á Neista-beinkinum varð undirstrikað, tá Dejan Lacok kom, sá og sigraði, eftir at Ári Dam hevði fingið reyða kortið**



Jákup Mørk

Neistin hevði tamarhald á tí nógva. Stutt undan steðginum líktist tað enntá sorli móti einum KÍF-liði, sum ikki hevði víst tað allarminsta, men altíð stríðsfúsnu kollfirðingarnir svaraðu aftur.

Undan steðginum minkaðu teir munin niður í fýra mál, og nakað inn í seinna hálvleik var øll høllin á gosi.

Ingi Olsen og Karl Oddmar Rasmussen fingu hvør sína útvísing. Og hóast Bergur Lützen hjá KÍF eisini fekk tveir fingrar, so var alt um fara í svart hjá Neistanum.

Tróndur Kragesteen kom ov tíðliga inn, tá hann varð innskiftur, og tað kostaði útvísing, og heilt galið mundi tað blivið, tá Árni Dam var sjey sentimetrar ov seinur, tá Gert Hansen og hann kapprunnu eftir bóltinum. Úrslitið varð, at Ári fekk reytt kort, og so skuldi Neistin í nærum tveir minuttir spæla við tveimum útispælarum móti fimm.

Og tað kundi – og átti kanska eisini – at kosta. 20-16 broyttist til 20-19, og bæði tvær og trýggjar ferðir høvdu gestirnir møguleika at javna. Einsamallir við innskifti Dejan Lacok megnaðu teir tó ikki at skora, og so reið Neistin stormin av.

Teir skoraðu tey fýra næstu álopini, og so knekkaði annars ósvikaligi stríðsviljin hjá kollfirðingum, sum at enda máttu leggja rygg til greitt tap.

### Kollfirðingar væl fyri

Støðan, har Dejan bjargaði Neistanum, hevði neyvan verið hugsandi, var tað nakað annað lið enn akkurát KÍF, sum Neistin spældi ímóti.

Fram um alt, so hava kollfirðingar ferð eftir ferð prógvað, at teir stríðast til seinasta bríkslið av einum hondbóltsdysti, og soleiðis var eisini hesaferð.

Væl stuðlaðir av áskoðarunum, sum rúgvaðu bróðurpartin av teimum 400, sum vóru í høllini, noktaðu kollfirðingar at geva seg yvir. Ási Dam var kanska leikbannaður, men tað bilti ikki tað heilt stóra, hóast Neistin eitt skifti hevði hug at leypa heilt avstað.

At tað so ikki bar á mál hesaferð, ger kanska minni hjá KÍF. Í løtuni er ilt at síggja nakað av hinum fýra liðunum, sum stríðast um at møta Neistanum í finaluni, taka kollfirðingar, sum framvegis hava alt at spæla fyri.

## FAKTA

**Neistin-KÍF 34-25 (15-11)**
**10 min:** 4-3
**20 min:** 11-5
**40 min:** 20-16
**50 min:** 28-22
**Málskjúttar**
**Neistin:** David Edvardsen 10(2), Sjúrður Thomassen 5, Ingi Olsen 5, Jugoslav Djumic 5, Finnur Hansson 5, Tróndur Kragesteen 2, Jákup Apol Hentze 1, Kristian Dulavík 1
**KÍF:** Regin Petersen 6, Andrias Nielsen 5, Rógvi Weyhe 3, Niklas Reginsson 3(1), Suni Johannesen 3(2), Tony Weyhe 3, Gert Hansen 3
**Brotskøst:** Neistin 4, KÍF 5
**Útvísingar:** Neistin 5, KÍF 7
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (beinleiðis reytt), KÍF 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

## Heppið reytt kort

Regin Petersen hjá KÍF var sjálvandi vónbrotin av, at hann og KÍF taptu móti Neistanum. Eisini hóast KÍF tvey skifti í dystinum misti alt ov nógv.

- Fyrst og fremst var tað heppið fyri teir, at Ári varð útvístur. Akkurát ta løtuna eiga vit at taka teir, men Dejan bjargar hasar tríggjar bóltarnar, sum vit eiga at senda í kassan.

- Eftir tað fara vit nakað niður við høvdinum, og so var ikki hugsingur hjá okkum um at fanga teir aftur, staðfesti Regin Petersen.

-mørk

## Mugu seta nýggj mál

Tað er vandi í allari vælferð.

Ingi Olsen, spælandi venjarin hjá Neistanum, er sjálvandi nøgdur um, at lið hansara longu hevur annað beinið í FM-finaluni, men samstundis sigur hann, at hetta er ein støða, sum kann gerast ein vandamikil koddi.

- Tey bæði seinastu árini hava í øllum førum víst, at tað ikki er nakar fyrimunur at vera nummar eitt. Í fjør kom H71 flúgvandi framvið VÍF, og fyrraárið hevði StÍF verið í finaluni í ein mánað, áðrenn vit spældu móti teimum.

Eru hyggjuráðini hjá tykkum so at tapa nakrar dystir nú, so tit ikki kenna tykkum alt ov tryggar?

- Nei, sjálvandi fara vit ikki at tapa dystir við vilja. Men vit mugu støðugt seta okkum nýggj mál. Alla tíðina arbeiða eftir lutum, sum vit kunnu betra, soleiðis at vit ikki gerast ov nøgdir við støðuna, sum hon er, segði Ingi Olsen eftir dystin.

-mørk